## Hjalgrim farin av Dimmu

1. juni leggur Hjalgrim Samuelsen frá sær sum fyritaksstjóri á Dimmalætting. Hjalgrim Samuelsen tók við sum fyritaksstjóri, tá Petur F. Christiansen legði frá sær fyri góðum átta árum síðani. Dimmalætting er ein familjufyritøka, sum abbabørn hjá Andras Samuelsen, fyrrverandi løgmanni og formanni Sambandsfloksins, eiga nógv tann størsta partan í. Listbeth L. Petersen og Beate L. Samuelsen eiga meirilutan. Nú Hjalgrim fer frá, er tað fyrstu fer síðani 1936 at eingin eftirkomari hjá Andras Samuelsen er í leiðsluni á ‚Dimmalætting. Onkrir eftirkomarar hjá Andars Samuelsen starvast tó framvegis á Dimmu.



## Lærarar gerast master

Á heimasíðu sínari hevur Føroya Lærarafelag spurt politisku flokkarnar nakrar spurningar, um skúlan og skúlamál. Ein av niðurstøðunum er, at allir flokkar eru samdir við Lærarafelagið um, at læraraútgbúgvingin skal vera ein fimm ára master útbúgving. Fólkaflokkurin er eitt sindur varin í sínum svari, men allir hinir taka undir við Lærarafelagnum. Sjálvstýrisflokkurin tekur eisini ávís atlit, men Lærarafelagið staðfestir tó, at tá hvørki hann ella Fólkaflokkurin er beinleiðis ímóti hesum, so verður læraraútbúgvin ein fimm ára master. – Annars er als einki trúvirði í politisku skipanini, slær Magnus Tausen, formaður í Føroya Lærarafelag fast.

# Cavling til Blekinge-gadebanden



*Journalisturin, Peter Øvig Knudsen, fær í dag fremsta danska journalistheiðurin, Cavling virðislønina*

**Journalisturin og høvundurin Peter Øvig Knudsen fær í dag handað Cavling-virðislønina fyri bókaverk sítt um Blekingegadebanden**

VIRÐISLØN
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin*

Í grundgevingini fyri at lata Peter Øvig Knudsen høgt mettu journalistvirðislønina verður millum annað sagt soleiðis:

- Í eini tíð, har yvirgangur javnan er á breddanum, gevur Øvig Knudsen eitt fjøltáttað, trúverdugt og týðandi íkast til at skilja tær mekanismur, sum elva til politiskan kriminalitet.

### Serstakt innlit

Sambært Cavling-nevndini eru tær báðar bøkurnar um Blekingegadebanden merktar av journalistiskum yvirliti og neyvleika. Við klassiskum, kannandi journalistikki, sakligum skrivistíli og gjøgnumskygdum keldutilfari gevur høvundurin lesaranum eitt serstakt innlit í virksemið á danska vinstravonginum í 1960'unum fram til 80'ini. Hartil vísir nevndin á, at Blekingegadebanden er ein væl søgd nútíðarsøga, sum vísir, hvussu langt ein bólkur av persónum er sinnaður at fara fyri at náa einum politiskum máli.

Bøkurnar um Blekingegadebanden hava ligið ovast á donsku metsølulistunum seinastu mánaðirnar.

### Fremsti heiður

Árliga Cavling-virðislønin verður latin journalisti, sum í serligan mun hevur sýnt áræði og evni í farna árinum. Virðislønin, ið er fremsta danski journalistheiðu, er á 20.000 kr. Hartil fær vinnarin eina lítla standmynd av Henrik Cavling, ið stovnaði keypmannahavnar journalistfelag í 1904.

Virðislønin verður handað Øvig Knudsen í dag kl. 15.00 í Journalisternes Hus í Keypmannahavn. Anders Fogh Rasmussen, forsetismálaráðharri, ið varðar av fjølmiðlunum, hevur boðað frá luttøku til handanina.

# Hent amboð hjá seyðaáhugaðum

**Nýggja bókin Hagar og seyðamark er eitt sera hent amboð hjá teimum, sum fáast við seyðabrúk og annan landbúnað**

BÓKAÚTGÁVA
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*




*Kári Thorsteinsson úr Søldarfirði hevur lagt nýggju útgávuna av "Hagar og Seyðamark" til rættis*

Nýggja útgávan av bókini Hagar og seyðamark, ið kom út stutt fyri jól, er munandi víðkað í mun til útgávuna frá 2001. Eisini eru yvirlitini yvir hagarnar og festislistin dagførdir, og nýggj kort eru gjørd av høgunum.

### Gomul føroysk virðismeting

Ein long røð av nýggjum og áhugaverdum greinum mynda Hagar og seyðamark hesuferð.

Fyrrverandi landsantikvarurin Arne Thorsteinsson hevur eina sera forkunnuga og viðkomandi grein um merkur, alin og gyllin sum er gomul føroysk virðismeting, har m.a. verður greitt frá upprunanum til verandi markatal.

Eisini er eitt samlað yvirlit yvir ognar- og landsjørðina og hvussu stórt áseyðatalið er í hvørjari markatalsbygd. Hartil eru útrokningar, ið vísa, hvussu nógvur seyður er fyri hvønn fermetur ella fyri hvørja mørk og eisini í hektarum.

### Seyðasýningar og slátur

Víða um landið er tátturin við seyðasýningum tikin uppaftur. Av tí at endamálið við seyðasýningum er rættiliga viðkomandi fyri seyðabrúk í Føroyum, er hetta evnið tikið við í Hagar og seyðamark. Við Arthuri Johansen á Strondum og Poul Samuelsen í Haldarsvík sum heimildarmonnum er skrivað nakað um seyðasýningar í serstakari grein í bókini.

Ofta hevur verið kjakast um, hvussu vit best tryggja, at kjøt verður hagreitt rætt. Í hesum sambandi hava Ingibjørg Egholm og Elsebeth Petersen, djóralæknar á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni, eina sera upplýsandi grein við heilsufrøðiligum ráðum um slátur, og hvussu vit hagreiða kjøtið rætt.

Tollakur Djurhuus hevur skrivað grein um seyða- og gásalitir í Øravík eftir Dánjal Jákup Mortensen, sum var seyðamaður í eitt mannaminni í Øravík.

Eisini hevur Ditlev Hammer í Hovi skrivað um gæs og gásahald í Hovi.

### Myndir og lógir

Nógvar nýggjar myndir eru við í útgávuni. Eitt nú er litmynd, ið vísir býtið millum lands- og ognarjørðina. Eisini eru mynd av upprunaseyðinum í Lítlu Dímun

Eisini er størri rúmd givin hesuferð fyri at hava allar viðkomandi lógir um landbúnað við í bókini.

Bókin er eitt sera hent amboð hjá teimum, sum fáast við seyðabrúk og annan landbúnað. Harumframt er útgávan viðkomandi hjá teimum myndugleikum, sum nevndir eru í landbúnaðarlóggávuni m.a. garðaskoðarar og øðrum.

Tað er Kári Thorsteinsson, ið hevur lagt Hagar og seyðamark til rættis og Búnaðgrunnurin, ið hevur givið hana út.

Bókin er 186 blaðsíður til støddar, prentað á Estra og innbundin á Prentmiðstøðini.